

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 12 - 2012

# Grønland - Umstrídd lóg samtykt

Grønlendska Landstingið samtykti í gjárkvøldið ta umstríddu lógina, sum gevur fyritøkum loyvi til at brúka útlendska arbeiðsmegi til stórar verkætlanir. Tá tingið atkvøddi um uppskoti, atkvøddu 13 tinglimir fyri. Eingin atkvøddi ímóti. Upprunaliga skuldi Landstingið avgreiða lógina fyri 14 døgum síðani, men eftir trýsti frá andstøðuni og ymsum áhugafelagsskapum varð avgerðin útsett til í gjár. Tey, sum finnast at lógini, siga, at hon ruddar slóð fyri, at arbeiðsgevarar kunnu innflyta bíliga arbeiðsmegi, og at politikararnir hava skundað lógina ígjøgnum, tí teir eru bangnir fyri at ræða tey stóru útlendsku vinnufeløgini burtur. Mótstøðan er kortini viknað eitt sindur í seinastuni, nú tað er avgjørt, at fólkið skal fáa lut í avgerðunum, og at teir útlendsku arbeiðsmenninir fáa rætt til at fara í verkfall. Eitt annað er, at lønin hjá teirri útlendsku arbeiðsmegini verður almannakunngjørd. Danir uppí Grønlendsku myndugleikarnir sleppa ikki undan at spyrja danir í sambandi við málið, tí tann parturin av lógini, sum snýr seg um útlendska arbeiðsmegi, víkir frá galdandi reglum um uppihalds- og arbeiðsloyvi. Tí verður tað neyðugt at orða eina serliga danska lóg fyri Grønland, sum ger tað møguligt aty brúka útlendska arbeiðsmegi til serliga stórar verkætlanir. . Danski løgmálaráðharrin, Morten Bødskov, sigur, at løgmálaráðið fer at seta seg í samband við teir grønlendsku myndugleikarnar, so arbeiðið við lógini kann setast í verk.